# Høgni Joensen komin í eina ómøguliga støðu

**– Hann hevur fingið eina uppsøgn, sum hann ómøguligt kann verja seg fyri. Sostatt kann spurnartekin setast við rættartrygd hansara, sigur Kristian Magnussen, løgtingsmaður, sum nú hevur reist málið um uppsagda aðalstjóran í tinginum**

UPPSØGN
*Áki Bertholdsen*

– Mín meting er, at tað er ikki Høgni Joensen, sum hevur verið trupulleikin í Almanna- og Heilsumálastýrinum. Eg haldi, at høvuðstrupulleikin er politiskur. Og tað er sjálvstýrisflokkurin, sum hevur gjørt Stýrið til eitt ótrygt arbeiðspláss.

Tað sigur Kristian Magnussen, løgtingsmaður.

Síðani tað kom fram, at Sámal Petur í Grund koyrdi aðalstjóran, Høgna Joensen, úr starvi, hevur Kristian Magnussen reist málið í tinginum.

Hann hevur sett landsstýrismanninum nakrar spurningar um viðurskiftini hjá aðalstjóranum og um orsøkirnar til hann skal úr starvinum. Seinni skal Sámal Petur í Grund svara teimum.

Kristian Magnussen sigur, at tað varð hann, sum setti Høgna Joensen í starvið og tí hevur hann áhuga í málinum. Hann hevur eisini áhuga í, at Almanna- og heilsumálastýrið virkar eftir ætlan.

Hann vísir á, at uppsagnargrundin er ógvuliga flótandi og lítið ítøkilig.

– Høgni Joensen verður sagdur upp, tí hann hevur ikki teir neyðugu, persónligu eginleikarnar til at røkja starvið.

– Sjálvur hevur Høgni Joensen fingið 14 dagar til at svara hesum fyrispurningum. Men tað er ómøguligt at svara uppá eina slíka, óítøkiliga atfinning. So óítøkiligum atfinngingum kann ongin verja seg fyri. Tí er Høgni Joensen komin í eina ómøguliga støðu, heldur Kristian Magnussen.

Hann vísir eisini á, at tá ið Høgni Joensen varð settur, var sjálvsagt eisini mett um hansara persónligu eginleikar og tá mettu somu fólk í umsitingini, at hann hevði júst teir røttu eginleikarnar til at røkja starvið.

– Spurningurin er tí, hvat er hent síðani, sum ger, at hann ikki hevur teir røttu eginleikarnir longur.

### Politisk orsøk

Kristian Magnussen heldur at tað er neyvan Høgni Joensen, sum er tann stóri trupulleikin í Almanna- og heilsustýrinum.

– Heldur er høvuðstrupulleikin politiskur. Sjálvstýrisflokkurin hevur umsitið stýrið í trý ár nú og eftir mínum tykki hevur flokkurin gjørt tað til eitt ótrygt arbeiðspláss. Eitt nú hevur tað tiltikna pensjónsmálið uttan iva kroyst starvsfólkið illa.

– Eg haldi tí, at tað er ovboðið, at ein nýggjur landsstýrismaður boðar frá, at nú skal stýrið endavendast og at tað hevur hann fingið fríar hendur til frá løgmanni og hinum landsstýrisfólkunum,

– Spurningurin er eisini, hvat tey trý, sum hava skrivað undir umsóknina, kenna til viðurskiftini, tey trý eru Løgmaður, løgmansstjórin, Marjun Hansusardóttir og Sámal Petur í Grund, sum er nýtilnevndir landsstýrismaður.

Kristian Magnussen heldur tí, at hetta eisini er ein spurningur um rættartrygd.

– Og tað er eitt álvarsmál, tí øll hava krav uppá eina rættartrygd. Og tað kann heldur ikki vera meiningin, at fólk kunnu verða søgd úr starvi, uttan at haldgóðar grundir eru fyri tí, sigur Kristian Magnussen, sum tískil kundi hugsa sær at fingið at vita, um nøkur haldgóð uppsagnargrund er.



*– Tá ið Høgni Joensen varð settur sum aðalstjóri í Almanna- og Heilsumálastýrinum, metti umisitingin, at hann hevði tær røttu, persónligu eginleikarnar at røkja starvið. Nú er hann sagdur upp, tí hann ikki hevur teir røttu eginleikarnar og Tað skilur Kristian Magnussen ikki. Hann hevur nú reist uppsøgnina av Høgna Joensen í Tinginum*


Nýtt bilverkstað lati upp í Vestmanna



Flest allar bilumvælingar vera gjørdar. Sera væl útgjørt til minni og størri bilskaðar



R.D.Bilar
Tlf. 424232 / 214232
Fax. 424732
Teldupost: rdbilar@post.olivant.fo


# Fingið fríar hendur

UPPSØGN
*Áki Bertholdsen*

Seinasta orðið er ikki enn sagt um uppsøgnina av Høgna Joensen sum aðalstjóra í Almanna- og heilsumálaráðnum.

Kristian Magnussen, løgtingsmaður, hevur reist málið í tinginum ,har hann hevur sett Sámal Petur í Grund, landsstýrismanni nakrar fyrispurningar.

Spurningarnir eru settir, áðrenn Høgni Joensen fekk uppsøgnina. Tá ið spurningarnir vórðu settir, var tað einans komið fram, at ætlanin var var flyta aðalstjóran í annað starv.

Kristian Magnussen vísir á, at eftir tænastumannalógini eru tveir møguleikar at flyta tænastumenn.

1. Broytingar í starvinum kunnu viðføra, at hann verður fluttur. Hann má tá ikki missa tign við flytingini.

2. Tænastumaður, ið hevur forbrotið seg, kann verða fluttur, men tá skal tænastumannakanning gerast fyrst.

Kristian Magnussen spyr, um landsstýrismaðurin ætlar at flyta aðalstjóran orsaka av broytingum í starvinum, hvat starv er so talan um, ið hevur somu tign sum tað at vera aðalstjóri?

Men um aðalstjórin skal flytast, tí hann hevur forbrotið seg, verður landsstýrismaðurin biðin um at upplýsa, hvussu hann forbrotið seg.

Og at enda spyr Kristian Magnussen, hvat landsstýrismaðurin ætlar at gera, um aðalstjórin og landsstýrismaðurin ikki verða samdir um treytirnar fyri flytingini.

### Fingið fríar hendur

Løgtingsmaðurin sigur, at síðan Sámal Petur í Grund varð settur í starv sum landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum, hevur hann verið nógv frammi í fjøðlmiðlunum um viðurskifti í Almanna- og heilsumálastýrinum. M.a. er hann endurgivin fyri at siga, at viðurskiftini eru sera vánalig, og at nú skal alt aðalstýrið endavendast, og at hann hevur fingið fríar hendur frá løgmanni og hinum landsstýrismonnunum. Hesi tíðindi eru rættiliga ørkymlandi.

– Í viðtal við Sosialin hevur aðalstjórin m.a. sagt, at hann metir tað óvirðiligt at verða uppsagdur í fjølmiðlunum, og at landsstýrið ikki hevur fylgt mannagongdunum í tænastumannalógini. Eitt nú vísir aðalstjórin á, at hann onga haldgóða uppsagnargrund hevði fingið, og at hann ongan hoyringsrætt hevði fingið.

– Er tað veruliga so, at landsstýrismaðurin hevur fingið fríar hendur politiskt til at seta landsins lógir og rættartrygdina hjá borgara til viks, ella hevur landsstýrismaðurin haldgóðar grundir at siga Høgna Joensen úr starvinum sum aðalstjóri, spyr Kristian Magnussen.



# Sýndu handarbeiði fram

**Styttru skeiðini hjá Føroya Handarbeiðsskúla í Klaksvík roynast væl, og nógv kemur burturúr**

HANDARBEIÐI
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Hósdagin hevði Handarbeiðsskúli Føroya í Klaksvík opið hús í sambandi við, at eitt av styttru skeiðunum á skúlanum var liðugt.

Ymiskt arbeiði varð sýnt fram, og lutirnir vóru bæði fjølbroyttir og snøggir.

Føroya Handarbeiðsskúli hevur seks ár á baki, og tað hava verð nógv longri og styttri skeið á skúlanum hesi árini. Í byrjanini legði skúlin seg eftir at hava skeið upp á tríggjar til fimm mánaðir, har undirvíst var í upp til 17 ymiskum lærugreinum.

Tað gjørdist tó trupult at fáa luttakarar til skeiðini, og tí avgjørdi skúlin at royna seg við styttri skeiðum frá einari viku og upp í 5, og hesi skeið hava fingið sera góða undirtøku.

### Fýra lærarar

Á Handarbeiðsskúlanum verður undirvíst í eitt nú brodering av føroyskum klæðum, tøving, patchwork binding, seyming, garving og veving.

Skúlin er dagskúli, og undirvísingin fer fram frá klokkan 8 á morgni til klokkan 3 seinnapartin.

Næmingar á skúlanum koma úr øllum landinum, og einki aldursmark er fyri at verða við.

Fýra lærarar eru knýttir at skúlanum, og tað ber eisini til at fáa serliga skeið løgd til rættis, um tað eru einstaklingar ella bólkar, sum ynskja tað.



*Hósdagin var framsýning av lutunum, sum eru gjørdir á seinasta skeiðnum á Føroya Handarbeiðsskúla.*

*Mynd: Eyðun Klakstein*

# Tvær nýggjar fløgur frá Tutl

**Tutl hevur fyri stuttum givið tvær nýggjar fløgur út. Talan er um tvær heldur óvanligar tónleikaútgávur, sum Tutl hesuferð hevur latið úr hondum**

TÓNLEIKUR
*Stefan í Skorini*

Tann eina fløgan ber heitið Just Before The Dawn. Tað eru upptøkur frá Corona Guiter Kvartett, sum eru gjørdar niðri í Danmark. Føroyingurin Ólavur Jakobsen einasti føroyingurin í bólkinum.

Hinir í bólkinum eru Per Dybro Sørensen, Volkmar Zimmerman og Tom Roy Nielsen, sum tíverri doyði, áðrenn fløgan varð útgivin.

Bara tvær skeringar eru á fløguni. Tann fyrra er í góðar tríggjar minuttir, meðan tann seinna varir heilar 22 minuttir. Skeringin kallast Foreplay, og hon er eitt verk eftir Dan Marmorstein.

Hin fløgan kallast Jakkin. Tíggju skeringar eru á fløguni, og upptøkurnar eru eftir øllum at døma gjørdar í Danmark fyri einum góðum ári síðani.

Jóan Jakku Guttesen hevur skrivað tekstin til øll tíggju løgini, og hann syngur, spælir bass og munnharpu. Við á fløguni eru nøkur av okkara fremstu tónlistafólkum. Terji Rasmussen syngur kór og spælir guitar, Tróndur Bogason Hansen spælir keyboard, Leivur Thomsen spælir elguitar, Rógvi á Rógvu er á trummum og Signhild Jacobsen leikar á klarinett.

Tað er Sightseeing Productions hevur staðið fyri hesi framleiðsluni.

# Skúlablaðið útkomið

**Fyrsta Skúlablaðið – málgagn fyri heim og skúla – er útkomið í hesum árinum. Tað er blaðið fyri mars mánað, og Skúlablaðið er nú farið undir 69. árgang**

SKÚLABLAÐIÐ
*Stefan í Skorini*

Málgangið fyri heim og skúla er nú aftur sent í heimini í Føroyum. Eitt, sum hevur nógv pláss inni í blaðnum, er skúlastýrisvalini. Hesi valini standa fyri durum, og eftir ætlan verða tey hildin í mei mánaði.

Skúlastýrini verða soleiðis mannað, at trý foreldraumboð verða vald triðja hvørt ár, tvey kommunustýrisumboð verða vald fjórða hvørt ár, eitt starvsfólkaumboð verður valt á hvørjum ári og skúlaleiðarin situr eisini í stýrinum.

Hetta við skúlastýrunum er ein nýggj lóg, sum Løgtingið hevur samtykt og sett í gildi. Skúlastýrini eru sett ístaðin fyri skúlaráðini, sum borgararnir fyrr valdu.

Annars er at siga um Skúlablaðið, at tað hevur onkrar áhugaverdar greinar, men tað er keðiligt, at eingir litir eru í blaðnum. Tað hevði prýtt almikið um útsjóndina á blaðnum og vakt áhugan hjá fólki enn meira.





-Góðir brúktir frá
REYNI SERVICE

**TOYOTA CAMRY 2,0 GLI** — Skrás.: 10-07-91, Km.: 129.000, Prísur: 62.600,- (Sýnaður 10-00)

**TOYOTA COROLLA 1,3 SEDAN** — Skrás.: 06-08-90, Km.: 229.000, Prísur: 38.600,-

**TOYOTA AVENSIS 1,8 SOL** — Skrás.: 26-03-98, Km.: 42.000, Prísur: 149.600,- Garanti*

**HONDA ACCORD 2,0 LS** — Skrás.: 18-06-97, Km.: 113.000, Prísur: 135.600,- Garanti*

**TOYOTA CARINA E 1,6 GXI L/B** — Skrás.: 09-11-95, Km.: 87.000, Prísur: 107.600,- Garanti* (Sýnaður 04-00)

**DAIHATSU SIRION 5 H AUTOM.** — Skrás.: 30-06-99, Km.: 22.000, Prísur: 112.600,- Garanti*

**TOYOTA CARINA E 1,6 SEDAN** — Skrás.: 30-05-94, Km.: 109.000, Prísur: 89.600,- Garanti*

**FIAT CINQUECENTO 170** — Skrás.: 19-08-97, Km.: 42.000, Prísur: 49.600,-

**TOYOTA CARINA 1,6 L/B** — Skrás.: 28-03-89, Km.: 165.000, Prísur: 53.600,- Garanti*

**BMW 320 I** — Skrás.: 06-04-90, Km.: 137.000, Prísur: 57.600,- (Sýnaður 12-00)

**TOYOTA COROLLA 1,4 SEDAN** — Skrás.: 14-04-00, Km.: 27.000, Prísur: 142.600,- Garanti*

**VOLVO 460 SEDAN** — Skrás.: 25-05-90, Km.: 92.000, Prísur: 48.600,- (Sýnaður 06-99)

**TOYOTA COROLLA 1,9 DIESEL STW.** — Skrás.: 20-07-00, Km.: 11.000, Prísur: 164.600,- Garanti**

**OPEL ASTRA 1,6 I STW.** — Skrás.: 03-11-97, Km.: 35.000, Prísur: 110.600,- Garanti*

**TOYOTA COROLLA 1,6 LUNA L/B** — Skrás.: 25-01-99, Km.: 28.000, Prísur: 112.600,- Garanti**

**CITROEN XANTIA DIESEL** — Skrás.: 01-06-95, Km.: 266.000, Prísur: 69.600,- (Sýnaður 03-01)

**TOYOTA COROLLA 1,6 LUNA H/B** — Skrás.: 15-03-99, Km.: 45.000, Prísur: 107.600,- Garanti**

**FORD ESCORT 1,8 DIESEL** — Skrás.: 16-08-91, Km.: 134.000, Prísur: 35.600,- (Sýnaður 01-01)

**TOYOTA COROLLA 1,3 H/B AUTOM.** — Skrás.: 21-07-97, Km.: 38.000, Prísur: 105.600,- Garanti* (Sýnaður 03-01)

**MAZDA 323** — Skrás.: 06-02-97, Km.: 85.000, Prísur: 82.600,-

**TOYOTA COROLLA 1,3 GALLA H/B** — Skrás.: 30-08-95, Km.: 74.000, Prísur: 75.600,- Garanti* (Sýnaður 11-00)

**DAEWOO NEXIA 3 HURÐAR** — Skrás.: 13-11-97, Km.: 53.000, Prísur: 48.600,-

**TOYOTA COROLLA 1,3 TERRA L/B** — Skrás.: 30-09-98, Km.: 52.000, Prísur: 115.600,- Garanti**

**FORD ESCORT 1,6** — Skrás.: 07-03-00, Km.: 19.000, Prísur: 125.600,-

**TOYOTA COROLLA 1,3 H/B** — Skrás.: 20-04-99, Km.: 7.000, Prísur: 114.600,-Garanti**

* Brúktir bilar yvir 75.000 kr. verða seldir við BRÚKTBILAVÁTTAN
** TOYOTA bilar hava 3 ára garanti frá fyrsta skrásetingar dato.

VØRUVOGNAR

**TOYOTA DYNA V/LAST** — Skrás.: 21-07-99, Km.: 33.000, Prísur: 160.600,-Garanti**

**NISSAN KING CAB 4X4 PICK_UP** — Skrás.: 30-05-96, Km.: 120.000, Prísur: 125.600,-Garanti*

www.reyniservice.fo

STØKK INN Á GÓLVIÐ

REYNI SERVICE

Opið: Mán.-frí. 8.00-17.00




Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040